


*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Sølmundur spurtaði seg til sigurin

**6-MANNAFØR KVINNUR** Eftir ikki sannførandi avrik seinastu ferðirnar, og eftir ikki serliga sannførandi start megnaði Sølmundur at taka Hvessing og harvið at tryggja sær FM heitið

**Tróndur Arge**

Møguleikin lúrdi fyri, at Hvessingur skuldi taka FM heitið frá Sølmundi. Um tað skuldi eydnast, so skuldi Hvessingur vinna, og so skuldi Sølmundur ikki vinna meiri enn triðja plássið.

At Hvessingur kundi vinna, var ikki so lítið sannlíkt, tí Hvessingur vann bæði á Fjarðastevnu og Vestanstevnu, tá ið sigrarnir vóru rættuliga sannførandi. Verri var at fáa eyga á, at tað skuldi eydnast t. d. Gongurólvi at fáa bilbukt við Sølmund.

Hvessingur legði seg eisini beinanvegin á odda, og eina løtu sá einki út hjá Sølmundi, tí Gongurólvur fekk góðan start og var eisini væl frammanfyri Sølmund, og harvið var FM heitið hjá Sølmundi rættuliga í vanda.

Men so var tað, at tær á Sølmundi rættuliga syrgdu fyri sær sjálvum. Á hálvum Molanum fóru tær framum Gongurólv, og síðani settu tær eftir Hvessingi, sum var tað mesta av einari bátslongd frammanfyri. Tað eydnaðist gula bátinum at taka tann grøna, og harvið tryggjaði Sølmundur sær bæði FM heitið og sigurin á Ólavsøku. Tað hevði verið nóg mikið, um Sølmundur endaði á øðrum plássi, men tað vildu tær av Skálafjørðinum ikki hava sitandi á sær.

Sigurin var so tepur, sum hann næstan kundi vera, men hann tóktist ógvuliga søtur, og tað var einki at siga til. Hetta var fyrsta ferðin nakrantíð, at Sølmundur við kvinnum vann FM!

| | |
|---|---|
| 1 Sølmundur | 04:43.00 |
| 2 Hvessingur | 04:43.05 |
| 3 Gongurólvur | 04:46.16 |
| 4 Riddarin | 04:46.17 |
| 5 Lómur | 04:59.23 |
| 6 Jarnbardur | 05:03.15 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Sølmundur (FM vinnari) | 47 |
| 2 Hvessingur | 44 |
| 3 Gongurólvur | 32 |
| 4 Riddarin | 31 |
| 5 Jarnbardur | 17 |
| 6 Lómur | 12 |
| 7 Kollfirðingur | 2 |

*trondur@sosialurin.fo*

# Fuglafjørður í stórum stíli




*Mynd: Jens Kristian Vang*

**5-MANNAFØR KVINNUR** Kvinnurnar umborð á Erlu Kongsdóttir vístu seg at verdugar meistarar, tá ið tær komu á mál fleiri bátslongdir frammanfyri næstu bátarnar

**Tróndur Arge**

At tær vóru verdugar FM heitið, sum tær ongantíð áður hava vunnið í hesi kappingini, høvdu tær væl og virðiliga víst kring landið fyrr í summar. Men tær umborð á Erlu Kongsdóttir vístu onga náði frammanfyri stóru áskoðarafjøldini.

Longu undan ólavsøkuróðrinum hevði Erla Kongsdóttir tryggjað sær FM heitið, og í dag staðfestu kvinnurnar í Fuglafirði so rudduliga, at tær eru so nógv tann besta manningin.

Bara nøkur fá tøk vóru tikin, tá ið grøni skuturin stakk seg framum hinar bátarnar, og síðani longdist tað bara.

Á Molanum var leyst millum Erlu Kongsdóttir og hinar bátarnar, og fram við stóru áskoðarafjøldini var talan um sannan uppvísningsróður hjá teimum úr Fuglafirði.

Kappingin um næstfremsta plássið var sera tøtt. Drekastavnið var júst frammanfyri Firvaldin, Firvaldin, sum var eina hálva bátslongd frammanfyri Blik, ið var fleiri bátslongdir frammanfyri Havfrúnna.

*trondur@sosialurin.fo*

| | |
|---|---|
| 1 Erla Kongsdóttir | 04:50.22 |
| 2 Drekin | 04:56.17 |
| 3 Firvaldur | 04:56.20 |
| 4 Blikur | 04:58.14 |
| 5 Havfrúgvin | 05:09.19 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Erla Kongsdóttir (FM vinnari) | 48 |
| 2 Drekin | 40 |
| 3 Firvaldur | 37 |
| 4 Blikur | 28 |
| 5 Havfrúgvin | 22 |